FJARSKIFTISEFTIRLITIÐ
TELECOMMUNICATIONS AUTHORITY

# Deildarleiðari

**fyri Eftirlitdeildina hjá Post- og Fjarskiftseftirlitinum og Tryggingareftirlitinum er leyst at søkja**

Eitt nýtt starv sum deildarleiðari fyri Eftirlitsdeildina hjá Post- og Fjarskiftseftirlitinum og Tryggingareftirlitinum er leyst at søkja.

Uppgávan hjá Post- & Fjarskiftiseftirlitinum er at umsita ávíkavist løgtingslóg nr. 135 frá 18. oktober 2001 um postvirksemi og løgtingslóg nr. 79 frá 23. mei 1997 um fjarskifti. Uppgávan hjá Tryggingareftirlitinum er at hava eftirlit við løgtingslóg nr. 3 frá 13. februar 1996 um tryggingarvirksemi, harundir tryggingarfeløgum og eftirlønargrunnum, ið hava fingið koncessión sambært lógini.

**Sí nærri um stovnarnar á:**
www.fse.fo
www.tryggingareftirlit.gov.fo

Post- & Fjarskiftiseftirlitið og Tryggingareftirlitið er fyrisitingarliga skipað saman við Kappingarráðnum og Skráseting Føroya.

**Arbeiðsuppgávar hjá deildarleiðaranum fevna m.a. um:**
- at útinna eftirlit sambært § 20, stk. 1-4 í postvirksemilógini, ráðgeving um viðurskifti í postøkinum v.m.
- at umsita fjarskiftislógina, harundir at viðgera umsóknir um konsessión, hava eftirlit við prísáseting og prísviðurskiftum, royna semju ella taka avgerð um sambindingarsáttmálar millum fjarskiftisveitarar, umsita nummartilfeingi, gera kanningar, menna rættarreglur innan økið, fylgja altjóða menningini innan fjarskifti v.m.
- at umsita tryggingarlógina, harundir hava eftirlit við tryggingarfeløgum og tvørgangandi eftirlønargrunnum innan fæfeingisgrundarlag, roknskap, gjaldførisbredda, íløgureglur, ognarviðurskifti, leiðslu og at menna rættarreglur v.m.
- at samskifta við aðrar viðkomandi føroyskar og útlendskar myndugleikar
- verða við til at betra um arbeiðsgongd og mannagongdir annars á stovninum
- harumframt kunnu verða líknandi uppgávur at loysa innan kappingarøkið og økið hjá Skráseting Føroya.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava:
- prógv sum løgfrøðingur ella vinnuløgfrøðingur,
- góð analytisk evni
- góðan kunnleika til føroyskt og enskt
- fyrisitingarroyndir innan fjarskiftisøkið, postøkið og tryggingarøkið er ein fyrimunur men ikki ein treyt
- royndir innan privata ella almenna fyrisiting

**Stovnarnir kunnu bjóða**
Eitt sera fjøltáttað og sjálvstøðugt starv við avbjóðandi uppgávum við stórum týdningi fyri vinnu og borgarar, sum eru persónliga og yrkisliga mennandi, umframt møguleika fyri nógvum samskifti við vinnulív, altjóða myndugleikar og aðrar myndugleikar í Føroyum.

Deildarleiðarin fær høvi til at taka fleiri skeið innan økini, umframt ráðstevnur o.a.

**Setanartreytir og umsókn**
Setanartreytir verða eftir galdandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og BLF. Setanin umfatar Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur stjórnarráð.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst seta teg í samband við Jógvan Thomsen, stjóra, á tlf. 35 60 20 ella 21 60 20 og t-post: jt@fse.fo

Umsóknir skulu sendast til:
Fjarskiftiseftirlitið
Skálatrøð 20
Postboks 73
FO-110 Tórshavn

og vera stovninum í hendi í seinasta lagi 26. november 2007 kl. 12:00. Umsóknir kunnu eisini sendast við t-post til jt@fse.fo

---

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya

# Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya søkir avloysara fyri lærara í barnsburðarfarloyvi

Eitt fulltíðarstarv sum avloysari fyri lærara í barnsburðarfarloyvi er leyst at søkja. Starvið verður sett 1. desember 2007 ella skjótast tilber og er til og við 30. juni 2008.

**Uppgávur:**
Á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum verður støðugt arbeitt við at menna útbúgvingina til sjúkrarøktarfrøðing, sum er á bachelorstøði. Broytingar henda alsamt, og sum lærari á skúlanum fært tú møguleika at luttaka í og ávirka broytingarnar.

Høvuðsuppgávurnar hjá læraranum fevna um undirvísing innan sjúkrarøktarfakliga og heilsuvísindaliga fakøkið, at vegleiða lesandi og at tryggja teimum eina holla útbúgving.

**Førleikakrøv:**
Sjúkrarøktarfrøðingur við viðkomandi framhaldslestri á kandidat ella masterstøði.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til rektaran, telefon 35 22 55 ella 21 59 90.

Umsókn við CV og prógvum verður at senda til:

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya
Att.: Súsanna M. Mortensen, rektari
Jónas Broncks gøta 25
FO-100 Tórshavn

**SJÚKRARØKTARFRØÐISKÚLI FØROYA**
Jónas Broncksgøta 25 · FO-100 Tórshavn · tel: 352 250
fax: 352 251 · heimasíða: srfs.fo · t-postur: srfs@srfs.fo

---

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya

# Upptøka av lesandi til SJÚKRARØKTARFRØÐING

Nýggjur flokkur byrjar 4. februar 2008. Umsóknarfreistin er longd til 15. november 2007

**Útbúgving og møguleikar**
Útbúgvingin til sjúkrarøktarfrøðing er spennandi og avbjóðandi og tekur 4 ár. Hon gevur heitið bachelor í sjúkrarøktarfrøði - Bachelor of Science (BSc) in Nursing. Útbúgvingin gevur tær fjølbroyttar starvs- og menningarmøguleikar innan heilsuverkið bæði her á landi og uttanlands.

Sum útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur hevur tú nomið tær holla vitan og førleika at útinna sjúkrarøkt, soleiðis at tú upplivir, at tú veruliga kanst gera mun.

**Hølis- og lestrarumstøður**
Hølisumstøður og umstøður skúlans yvirhøvur eru avbera góðar. Sjúkrarøktarfrøðiskúlin og seinni søgu- og samfelagsdeildin á Fróðskaparsetrinum fluttu fyrr í hesum árinum í nýggj nútímansgjørd høli miðskeiðis í býnum. Alt tilfar og øll útgerð lúka tíðarinnar krøv.

Saman við 120 øðrum lesandi, væl útbúnum lærarum og starvsfólki verður tú partur av einum virknum og vinarligum lestrarumhvørvi, har trivnaðurin er í hásæti.

**Lestrarvegleiðing**
Lestrarvegleiðari skúlans veitir vegleiðing og góð ráð. Teldupostbústaðurin er: anne.lise.winther@skulin.fo, tlf. 325 265.

**Umsókn**
Teldutøkt umsóknarskjal kann takast niður av heimasíðu skúlans, www.srfs.fo, ella tú ringir 352 250 og biður um at fáa tað sent í postinum. Á heimasíðuni kanst tú eisini lesa um upptøkutreytir o.a.

Umsóknir skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 15. november 2007 og verða sendar til

**Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya**
Jónas Broncks gøta 25
FO-100 Tórshavn
merk brævbjálvan: Umsókn lesandi

**SJÚKRARØKTARFRØÐISKÚLI FØROYA**
Jónas Broncksgøta 25 · FO-100 Tórshavn · tel: 352 250
fax: 352 251 · heimasíða: srfs.fo · t-postur: srfs@srfs.fo

---

# Heystmøtir á Argjum

## v/Thorkild Højvig

**Fríggjakvøld 2. nov. kl. 20.00**
Evnið: Leiða til Kristus (1)
Sangur: Jan og Hans Pauli

**Leygarkvøld 3. nov. kl. 20.00**
Evnið: At liva í Kristusi
Sangur: Tær tríggjar har vesturi

**Sunnukvøld 4. nov. kl. 18.00**
Evnið: Leiða til Kristus (2)
Sangur: Manskórið í Thabor, Fuglafjørður

**Barnansing øll kvøldini.**

**ØLL HJARTALIGA VÆLKOMIN!**
Stýrið fyri Kirkju- og missiónshúsið á Argjum

---

FISKIRANNSÓKNARSTOVAN
FAROESE FISHERIES LABORATORY
Nóatún · Boks 3051 · FO-110 Tórshavn

Lutakast um 10.000 kr verður á Vinnuháskúlanum í Havn mánadagin 5. november kl. 14.30. Eisini verður greitt frá toskamerkingum.

Øll eru vælkomin.